# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Spennandi samráðingar bíða

Tað vakti stóran ans, tá ið Petur Reinert, sáli, á útróðrarstevnu í Klaksvík helt fyri, at flotin hjá føroyingum í Norðsjónum ikki var meiri verdur enn stálpláturnar, sum skrokkarnir vóru úr. Gongdin hevur víst, at hugsjónarmaðurin var í so skjótur við útsøgnini.

Hesi 35 árini eru stór virði eru vunnin í Norðsjónum og í fremmandum sjógvi sum heild. Royndirnar hava eisini verið, at virðini, sum eru fingin burtur úr føroyskum sjógvi, eru vaksin, og at tey, sum eru fingin úr fremmandum sjógvi, eru minkað, og samstundis hevur tað víst seg, at tað hevur riggað væl at býta um kvotur.

Í hesum døgum eru fiskivinnusamráðingar við onnur lond. Í síðstu viku vóru samráðingar í Noregi og í Brússel. Hesa vikuna verða samráðingar við Russland og Ísland.

Síðani Atli Dam, sáli, ið var tikin úr leikum sum samráðingarmaður, um tað mundið, tá ið fiskimørkini í 1977 vórðu flutt út á 200 fjórðingar, samráddi rammusáttmálar upp á pláss, hava árligu samráðingarnar snúð seg um justeringar við støði í forsøgnunum um, hvussu tað hevur staðið til við fiskastovunum.

Soleiðis er tað sannlíkt, at samráðingarnar við Noreg, ES og Ísland eisini verða hesa ferð. Tað sæst aftur í, at føroysk skip síðani ársskiftið hava roynt í norskum og íslendskum sjógvi, hóast 2010 sáttmálarnir ikki eru undirskrivaðir. Soleiðis plagar tað at vera, og talan er um støðugt og álitisfult samstarv.

Stóri spurningurin er, hvussu tað verður, tá ið Føroyar og Russland fara at samráðast. Ivaleyst fara føroysk skip eisini í ár at royna í russiskum sjógvi. Men tað er einki at liggja omaná, at Skálaberg málið bar órógv við sær um, hvussu tað nú verður við samstarvinum við russarar. At einki kom burturúr, tá ið samráðingarnar herfyri vóru í Føroyum, er undirstriking av hesum veruleika.

Seinastu vikurnar hevur fleiri ferðir verið frammi, at virðið á tí, sum russarar fiska í føroyskum sjógvi, er fleiri ferðir størri enn tað, sum føroyingar fiska í russiskum sjógvi. Hetta er ikki so galin veruleiki av hava við sær til samráðingarnar.

Rammusáttmálarnir við Russland og hinar tjóðirnar eru framvegis galdandi. Setningurin hjá okkara royndu og dugnaligu samráðingarfólkum er at fáa so nógv burturúr til samfelagið, sum tað ber til. Tað valdast um at viga tað, sum skal latast úr føroyskum sjógvi, upp ímóti tí, sum kann fáast aðra staðni.

Tað er neyvan skilagott at kubba á stokkinum. Men tankin er ikki so fremmandur nú, sum hann hevur verið, at føroyski flotin í russiska partinum av Barentshavinum í framtíðini ikki fer at hava so stórt virði, sum hann kanska fer at hava í føroyskum sjógvi. Um eina viku fara vit at vita meiri um hetta!

**Sosialurin**

## Ein spurningur til Høgna Hoydal

**HELGI ABRAHAMSEN**



Vísandi til greinina niðanfyri, havi eg ein stuttan spurning til Høgna Hoydal.

Hann vísir á, at samgongufólk hava ført fram, at skattalættarnir hjá fullveldislandsstýrunum vóru líka stórir sum skattalættarnir hjá ABC-samgonguni.

Av tí at eg eri ein av teimum, sum hava ført hetta fram, vil eg fegin undirstrika, at tað sum eg havi sagt um skattalættarnar hjá fullveldislandsstýrunum, er ein tilvísing til tað, sum Høgni Hoydal segði undan valinum í 2004. Tí vil eg spyrja hann henda spurning:

Um skattalættarnir frá 1998 til 2003 bara kostaðu 103 mió. krónur, hví segði Høgni Hoydal so í 2004, at fullveldislandsstýrini høvdu givið skattalættar fyri næstan 400 mió. krónur? Royndi hann at lúgva fyri Føroya fólki? Ella hvør er forkláringin?

## Rættleiðing

**DÁNJAL HØJGAARD**

Í Sosialinum 13. januar verið eg sum talsmaður hjá tíðindafólkunum í Kringvarpinum endurgivin fyri at halda, »at tíðindaflutningurin hjá Kringvarpinum nú er komin niður á so lágt støði, at tíðindafólkini skammast við arbeiði sítt«.

Eg vil vísa aftur, at eg nakrantíð havi sagt hettar. Hettar er ein misskiljing. Samrøðan snúði seg um, hvussu støðan verður, um fíggjarætlanin hjá kringvarpsstjóranum verður framd. Tað, sum eg segði var, at tíðindafólkini eru longu hart sperd í dag, og at fíggjarkarmurin fer at gera støðuna fakliga óforsvarliga.

Orsøkin til at 17 starvsfólk í dag siga greitt frá og átala fíggjarætlanina fyri 2012 er júst at forða fyri, at vit koma í eina støðu, sum verður ótolandi bæði fyri okkum og hyggjararnar/lurtararnar. Men vónandi koma vit ongantíð so lagt, at vit hava grund til at skammast um tíðindaflutningin.

## Øll skulu hava gleði av ognum sjúkrakassans

Ognir sjúkrakassans skulu sjálvsagt skulu nýtast til alment gagnlig endamál, ið hava til endamál at varpa ljós á heilsu, betra um heilsuna hjá fólki og møguliga kunna hjálpa fólki, hvørs heilsustøða ikki er so góð.

Sjúkrakassanir eru ogn fólksins, og mugu nýtast til alment gagnlig mál. Tí kann tað ikki koma upp á tal, at sjúkrakassarnir taka ognirnar hjá okkum øllum til at gera privatar heilsutryggingar, sum bert partur av fólkinum hevur ráð til. Heldur skulu vit leggja okkum eftir at fáa Heilsutrygd somikið góða, at óneyðugt verður við privatum ískoytistryggingum.

Tað er møguligt, at farið er knortlut fram í málinum um at broyta sjúkrakassaskipanina til Heilsutrygd, men tað er ongin umbering fyri at ognartaka ognirnar hjá okkum øllum, til at gera eina trygging til nøkur fá.

Áheitan Samtak er tískil á ovastu leiðslurnar í sjúkrakassunum um at gera ein sáttmála við landsstýrið, sum ger, at ognir sjúkrakassans verða nýttar til nøkur góð alment gagnlig endamál heilsuni at frama. Tað er týdningarmikið, at ognirnar ikki fara í vanliga raksturin í landskassanum.

Tað er í hesum sambandi ógvuliga viðkomandi at nýta part av fænum til heilsugransking og gransking í tí sunna- og heilsugóða arbeiðsumhvørvinum. Partur av fænum kundi verið nýttur til annað, t.d. vita vit, at tað er ein ógvuliga djúpur smeitur hjá eini familju, um annar av forsyrgjarunum gerst langtíðarsjúkur. Nakað av fænum kundi eisini verið nýttur at varpa ljós á sálarliga heilsu.

Møguleikarnir eru nógvir, og partarnir í málinum áttu at tosa saman um, hvussu peningurin kann nýtast á frægasta hátt, so tað kemur okkum øllum til góðar.

**Samtak**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.